

# Málsviðgeri

Av tí at virksemið á Mentamáladeildini er økt nógv, verður søkt eftir dugnaligum málsviðgera.

Eyðkenni fyri Tórshavnar kommunu er ein virkin og fjølbroytt mentan. Í starvinum kanst tú vera við til at menna mentanina í kommununi.

## Mentamáladeildin

er deild undir trivnaðarfyrisitingini. Deildin hevur um hendi menta- og skúlamál og ítróttarmál.

Deildin umsitur tann partin av føroyska skúlaøkinum, ið við lógum um fólkaskúla, frítíðarundirvísing o.a. er skipaður hjá kommununum. Til deildina hoyra: Fólkaskúlarnir, musikkskúlin, kvøldskúlin, býarbókasavnið, býarsavnið, svimjihøllin og stadionøkið.

## Kommunan bjóðar

eitt áhugavert starv við fjølbroyttum og mennandi uppgávum, har tú arbeiðir sjálvstøðugt og hevur góðar møguleikar fyri fakligari og persónligari menning.

## Nakrar av høvuðsuppgávunum eru:

- at vegleiða og ráðgeva leiðslu og politiska myndugleikanum í spurningum á mentamálaøkinum
- at fyrireika, málsviðgera og avgreiða mál hjá mentamálanevndini
- at luttaka í og standa fyri verkætlanum á mentamálaøkinum og gera útgreinandi arbeiði í hesum sambandi
- at samskifta við skúlar, stovnar, feløg og einstaklingar, sum virka á mentamálaøkinum
- at skipa fyri hátíðarhaldum og mentanarligum tiltøkum

## Førleikakrøv

Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni ella samsvarandi royndir og kunnleika til økið.

Umsøkjari skal duga føroyskt og enskt til lítar, og hava kunnleika til teldu á brúkarastøði.

Kunnleiki til fyrisitingarrætt er ein fyrimunur, men eingin treyt, tí at kommunan støðugt skipar fyri skeiðum fyri starvsfólki á hesum øki.

## Persónligir eginleikar

Umráðandi er, at umsøkjarin er áhugaður í mentamálaøkinum, er fyrikomandi og dugir væl at samskifta bæði innan- og uttanhýsis. Viðkomandi skal duga at leggja tilrættis og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

## Setanarviðurskifti

Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

## Meir fæst at vita

Um starvið við at venda sær til Jákup Simonsen, deildarleiðara, ella Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóra, tlf. 30 20 10.

## Umsóknir

saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 12. november 2007.

**Tórshavnar kommuna**

um...
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
...er lisin
-so ert tú við!

XL BYG Balslev.fo

Vit søkja eftir
sølufólki til køksdeildina

Sí lýsing á heimasíðu okkara

www.balslev.fo

Sun Investments S.L.
Húsasøla frá Spanien

**Verður í Hotel Tórshavn leygardagin 20. oktober 14.00-18.00**
At ogna tær hús/íbúð í Spanien er lættari enn tú heldur.
– ikki bert ein dreymur!! Kom og fá nærri at vita.

Lætt at fáa lán

